
*Løgtingið júst samtykt nýggja lóg um loyvisgeving.*

# Lættari og skjótari at fáa boriloyvi

**OPEN DOOR** Løgtingið hevur samtykt lóg, sum ger, at oljufeløg nú kunnu søkja um leitiloyvi, uttan at tað hevur verið eitt útbjóðingarumfar beint frammanundan. Higartil hevur tað verið soleiðis, at man kann bara søkja eftir, at tað er alment lýst, og ein løgtingslóg er gjørd.

Jan Müller

Herfyri samtukti løgtingið endaliga eitt uppskot frá Johan Dahl, oljumálaráðharra um at geva betri rúmd fyri oljuleiting á landgrunninum. Eitt sokallað "open door" tiltak. Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi, heldur uppskotið kann fáa stóran týdning fyri oljuleitingina við Føroyar.

– Tann praktiski týdningurin er tann, at nú kunnu feløg søkja um loyvi, uttan at tað hevur verið eitt útbjóðingarumfar beint frammanundan. Higartil hevur tað verið soleiðis, at man kann bara søkja eftir, at tað er alment lýst, og ein løgtingslóg er gjørd. Men hetta fer at merkja, at tey øki, sum higartil eru boðin út, har kunnu oljufeløg tann dag í morgin koma og banka á dyrnar og siga, at tey fegin ynskja eitt loyvi í hesum ella hasum økinum. So tað verður meira liðiligt.

## Lofta áhuga

– Men at vit fáa hesa lógina nú, er tað tí tit vita, at tað eru feløg, sum hava áhuga í at leita í ávísum økjum, sum fyrr eru boðin út?

– Vit vita tað ikki her og nú, men vit hava fyrr upplivað, at tað hava verið feløg, sum hava spurt um eitt og annað og hava víst áhuga, men tá tey so hava fingið at vita, hvussu mannagongdin er, so hava tey ikki gjørt meira. Og so eru tey vekk. Tað ræður um at lofta teimum, meðan áhugin er har. Tí um hann er í dag er ikki vist, at hann er har í morgin. So uppá tann mátan hevur hetta ein ávísan týdning. Haraftrat hava vit nú ætlanir um at marknaðarføra tað føroyska økið meira aktivt enn vit kanska hava gjørt millum útbjóðingarumførini. Skal tað geva nakra serliga meining má man eisini kunna vísa á, at tað eru øki, sum eru tøk og sum tey kunnu fáa.

Hetta er tó ikki nakað, sum fer at gera nakað heilt stórt hol í sjógvin. Men um tað bara er eitt loyvi, sum verður latið á henda hátt, so er tað gott.

– Men hví skulu oljufeløg vera áhuga at koma inn og bjóða uppá øki, sum aðrir hava borað og kastað frá sær?

– Tað sær man meira enn so. Tað kann bæði vera talan um øki, sum aðrir hava kastað frá sær og øki, har man als ikki hevur borað. Tað er nokk so ymiskt, hvussu feløgini síggja uppá somu øki men tað kunnu so eisini verða heilt onnur øki, sum als ikki hava verið loyvisløgd fyrr. Talan er her um øll øki, sum eru boðin út fyrr og ikki bert tey, sum hava verið loyvisløgd. So tað kann saktans hugsast.

– Nú vita vit at Marjun brunnurin, sum Hess fann, varð eitt fund men meira bleiv ikki gjørt við tað økið, tí tað lá og djúpt. Er tað eitt stað, sum feløgini kunnu fara at vísa nýggjan áhuga?

## BP

– Tað hevur helst nakað við tøkni at gera, at man ikki sá seg føran at gera meira við tað fundið. Oljan var har men tað vísti seg at vera eitt rættiliga kompliserað felt. Og tað er ikki so, at vit hava merkt nakran beinleiðis áhuga at fara har aftur, so um nakar kortini ynskir tað dugi eg ikki at siga.

– Tá BP boraði William-brunnin varð brunnurin sum so ikki endaliga sleptur, men proppur varð settur í heldur enn at fylla alt við betongið. Merkir tað nógv fyri, at lonur oljufeløg kunnu koma inn og bora har aftur?

– Tað økið bleiv latið inn aftur, og tað er trygt fráfarið. Men tað varð gjørt soleiðis, at tað er lætt at koma til tað aftur, soleiðis at man